Nr. 6 | 15. september 2007 | 60. árið

# Kirkjuligt Missiónsblað

# Sáðmaðurin og sáðið

"Ein sáðmaður fór út at sáa sáð sítt og ... sáðið er Guds orð." Luk. 8,5 og 11.

Hetta líknilsið umfatar øll menniskju! Onkustaðni kunnu vit síggja okkum soleiðis, sum Gud sær okkum. Sáðið er orðið, og mátin, sum vit móttaka tað uppá, vil seta okkum í tann flokkin, har vit hoyra heima.

"Og í tí hann sáaði, fell sumt sáðið fram við vegnum og varð niðurtraðkað, og himmalsins fuglar ótu tað upp."

"Og tey fram við vegnum eru tey, sum hoyra á; síðani kemur Djevulin og tekur orðið úr hjarta teirra, til tess at tey ikki skulu trúgva og verða frelst." v. 5 og 12.

Tey hoyrdu orðið, annaðhvørt við at lesa tað, ella tey hoyrdu tað boðað; men áðrenn tey fingu upp í lag at gera nakað við tað, lótu tey Djevulin skræða tað frá sær, við tað at tey gloymdu, at hann bara fær skrætt sáðið frá okkum, um vit loyva honum at gera tað. Jesu blóð er til taks fyri okkum øll, og um vit biðja inniliga til Gud, kunnu vit standa ímóti álopunum hjá Djevlinum. Bíblian sigur, at gera vit tað, vil hann flýggja frá okkum.

Kortini eru tað mong, sum gleða fíggindan við at lata vánaligar hugsanir fara út og inn gjøgnum sinnið. Skjótt aftaná dvølja tey við hesar hugsanir ístaðin fyri at sleppa sær frá teimum, hvørja ferð Djevulin kemur við teimum. Tær næstu hugsanirnar, sum koma í hugan, eru, at kanska er hetta rætt, og ikki varar leingi, fyrr enn tað hevur eydnast at skræða orðið út úr hjartanum

Vónandi er tað ikki tú, ið her er talan um. Men Harrin hevur meir at siga, og kanska verður tað har, tú hoyrir til.

"Og sumt fell á hellubotn, og tá ið tað vaks, følnaði tað, av tí at tað fekk onga vætu."

"Men tey á hellubotninum eru tey, sum taka við orðinum við gleði, tá tey hoyra tað; men hesi hava onga rót; tey trúgva eitt skifti; og á royndarstund falla tey frá." v. 6 og 13

Her talar Jesus um tey, sum njóta at vera nakrar minuttir undir orðinum, tí tey føla seg at hava gjørt nakað rætt. Men tað festi ikki rót. Tey lósu tað bara og góvu sær ikki stundir at hugsa gjøllari um tað, lata upp fyri tí, so tað kundi koma djúpari niður í hjartað. Tá ið so freistingin kom, fullu tey, tí ongar røtur vóru. Orðið var ikki trongt ígjøgnum.

At lesa og biðja er eitt arbeiðið, sum ikki skal gerast skundisliga við hugsanini um, at nú hevur tú gjørt skyldu tína, og so er tað nóg mikið. Mong eru dølsk, tá ið tað ræður um at menna okkara andaliga vøkstur; men tað hjálpir, um vit gjøgnum dagin fáa eina fríløtu, og tá hugsa um tað orðið, vit fingu um morgunin, og lata tað blíva ein part av okkum sjálvum. Tá ið freistingin kemur, tá hava vit orðið til vernd.

Kanska hevur tú ikki enn funnið teg sjálvan í hesum líknilsinum; men so er her tað triðja, sum vit kunnu spegla okkum í:

"Og sumt fell mitt niður millum tornir, og tornirnar vuksu upp við og køvdu tað." "Men tað, sum fell millum tornirnar, tað eru tey, sum hoyra og síðan

verða køvd av lívsins sorgum og ríkidømi og njótingum og ikki bera búna frukt." v. 7 og 14.

Hvussu taka vit ímóti "lívsins sorgum"? Hanga hugsanirnar fastar við tær og enda í berum høvuðbrýggi? Áðrenn langt um líður, kann tað køva orðið, sum varð sáað og vaks. Og tað hendir, tá ið tú verður meira upptikin av heimsins lutum enn av tínari andaligari støðu.

Um vit lova Harranum at sleppa framat, vil hann syrgja fyri tí, okkum er tørvur á, tí hann hevur sagt: "Men søkið fyrst Guds ríki og rættvísi hansara, so skal alt hetta verða tykkum givið umframt." Matt. 6,33.

So er eitt slag av jørð eftir, og kanska er tað har, tú ert staddur. "Og sumt fell í góða jørð, og tað vaks upp og bar hundraðfaldan ávøkst."

"Men tað í teirri góðu jørðini, tað eru tey, sum, tá tey hava hoyrt orðið, goyma tað í einum vøkrum og góðum hjarta og bera frukt í tolni." Luk. 8,8 og 15.

Tað er vísdómur at hoyra orðið og gera av at varðveita tað. Tann maður og kvinna, sum gera tað, skilja, at tá ið skrivað stendur: "Elskið ikki heimin, ikki heldur teir lutir, sum eru í heiminum," (1. Jóh. 2,15) so elska tey ikki heimin, og tað, sum hoyrir honum til. Tey lata seg ikki freista av honum, tí tey hava bara tað í tonkunum, um tey kunnu gerast sonn kristin, sum bera frukt.

Tey vita, at tá ið tey blivu frelst, blivu tey nýggir skapningar í Jesusi Kristi. "Hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt!" 2. Kor. 5,17.

E. Campbell umsetti.

ANDAKT

# Fylg Jesusi

"Dagin eftir ætlaði hann at fara avstað til Galileu, og hann finnur Filippus; og Jesus sigur við hann: »Fylg mær!«" (Jóh 1,44).

Hann, sum sær Jesus, sum kemur til hansara er kallaður at fylgja honum eftir. At síggja Jesus, at koma til hansara og at fylgja honum, er tað sama sum at trúgva á hann.

Við Filippus sigur Jesus hesi bæði orðini: "Fylg mær!". Tann, sum trýr á Jesus, fylgir honum. Kristin trúgv er ikki at vera **Jesus-tilhangari**, at halda seg til hann, sum ein nú heldur fyri best. Trúgv er at vera ein **Jesus-eftirfylgjari**, og gera sum hann sigur.

Bara sum eftirfylgjarar hansara gerast vit lærusveinar hansara og kunnu ognast frelsuna í honum.

At fylgja Jesusi merkir at halda okkum til hansara sum lærlingurin til lærumeistaran. Sum lærlingurin hevur nógv at læra og royna, er hetta eisini galdandi tey, sum fylgja Jesusi. Guds børn treingja til vegleiðing, áminning og troyst. Og sum tey soleiðis fylgja honum, læra tey at liva rætt og tæna sínum næsta.

Fyrst ***kallaði*** Jesus lærusveinarnar at fylgja sær, og so ***sendi*** hann teir at boða evnageliið um syndanna fyrigeving og hjálpa menniskjum í neyð. Fyrst kallið at fylgja Jesusi, so sendingin at fara við honum út til onnur menniskju. Fyrst at fylgja, so at tæna. Við Pætur og Andreas sigur Jesus eina aðrastaðni: "Fylgið mær eftir, so vil eg gera tykkum til mannafiskarar!" (Matt 4,19).

Trupulleikin hjá menniskjum er, at tey hava lyndi at venda alt á høvdið. Jesus halda tey ikki, tey hava fyri neyðini, og so slettis ikki sum tí krossfesta fyri synd og neyð teirra. Men at tæna og gera góðar gerðir, tað halda tey er neyðugt.

Og rætt er tað, at gerningar hava týdning, men fyrst tá ið teir eru sprotnir úr trúnni á Jesus Krist. Trúgvin á Jesus sum veitir okkum fyrigeving og frelsu, og hon føðir gerningar, sum æra Gud og gagna næsta okkara.

Við trúnni fáa vit viðurskifti við Gud í lagi, og við okkara gerningum tæna vit næsta okkara í neyð hansara. Trýrt tú á Jesus, sum tínum frelsara, so fær trúgvin eisini føtur at ganga á, og hendur at arbeiða við og tungu at signa við.

Fylg tú Jesusi, so vil hann gera teg til sín tænara! "Fylgið mær eftir, so vil eg gera tykkum til mannafiskarar!" Amen!

Bergur Debes Joensen

# Ársmøti Kirkjuliga Missiónsfelagsins

## Missiónshúsið við Landavegin, Landavegur 20, Tórshavn

## 20. – 23. September

**Hósdagur 20 september**

kl. 20.00 Møti við Ingolf Henoch Petersen

**Fríggjadagur 21. september**

kl. 16.00 Bíbliutími við Egil Joensen
kl. 20.00 Missiónsmøti: Ingolf Henoch Petersen
og Anne Lene Olofson tala,
Hans Pauli og Jan Jacobsen syngja

**Leygardagur 22. september**

kl. 10.00 Bíbliutími við Ingolf Henoch Petersen
kl. 16.00 Møti: Ingolf Henoch Petersen, talar
kl. 20.00 Sjónvarpsmøti: Hanus Simonsen og
Jústinus Poulsen tala
Julia, Jónhard og Lisabeth syngja
kl. 22.00 Ungdómsmøti: Ung skipa fyri

**Sunnudagur 23. september**

kl. 14.00 Familjumøti: Noomi Reinert og
onnur skipa fyri
kl.17.00 Møti : Ingolf Henoch Petersen og
Tummas Lauritsen tala
Árni Petersen og onnur syngja

# 5. Illgrasið uppi í hveitini.

## Úr bókini sådan er Guds ord hjá Øvind Andersen.

Líknilsið sjálvt finna vit hjá Matteusi í kap. 13, 24-30, og frágreiðing Jesusar um tað, finna vit í sama kapitli vers 36-43. Vit skulu halda okkum til frágreiðing Jesusar um hetta líknilsi. Fyri okkum ger hann greitt, at har, hann sáar sáð sítt, júst har er tað, at sálarfíggindin sáar sítt illa sáð. Sálarfíggindin fer til arbeiðis har, ið Jesus virkar, endamálið er jú, at oyðileggja verk Jesusar.

Sáðið í hesum líknilsi er ikki orð Guds, men børn Ríkisins, sigur Jesus, og tað illa sáðið eru børn djevulsins. Tað álvarsama er, at hesi líkjast hvørt øðrum, soleiðis at menniskju sum heild ikki síggja serligan mun. Tá sálarfíggindin skal oyðileggja verk Jesusar, ger hann tað gjøgnum menniskju, ið síggja út sum kristin, og sum fólk flest halda vera kristin.

Lendið ið sáað verður á, er ikki Guds ríki, sum mong vilja halda. Tey vilja vera við at veltan er tað sama sum kirkjan. Jesus sigur tað beint øvugta, nevniliga, at veltan er heimurin. Tað er vilji Guds, at hin kristna kirkjan skal vinna heimin fyri Jesus. Tey trúgvandi skulu vera tað sáð ið breiðir út Guds ríki millum verðslig menniskju og leiðir tey fram til frelsu og sælu. Hetta hevur elvt til ein falskan hugsunarhátt, ið hevur troka seg inn hjá mongum menniskjum. Tey síggja mótsetningin millum hendan heim og kirkjuna sum tann veruliga mótsetningin. Kirkjan verður heimur Guds, meðan heimurin uttanfyri verður øki djevulsins. Gamaní hevur hesin hugsunarháttur eitt vet av sannleika í sær, men hetta leiðir okkum kortini burtur frá tí, sum Jesus í roynd og veru leggur okkum á hjarta í hesum líknilsi.

**Tann veruligi mótsetningurin millum tað ónda og tað góða.**

Vit kundu eisini kallað tað tann veruliga mótsetningin millum Jesus og Djevulin. Hvar er hann at finna ?

Sambært tulking Jesusar finst hann ikki sum ein mótsetningur millum heimin og kirkjuna, men sum ein mótsetningur innan kirkjuna. Tað er millum tað góða sáðið, at illimaður hevur sáað tað illa sáðið. Tað er, har sum tey trúgvandi liva og virka, at djevulin eisini arbeiðir og virkar. Tað merkir í roynd og veru, at tað, sum vit nevna kirkja, bæði er av tí ónda og tí góða. Tað vanliga kirkjuhugtakið - sum í veruleikanum verður tað kirkjurættarliga kirkjuhugtakið - er allan vegin ígjøgnum óbíbilsk og falskt, tá vit skulu døma tað í nýggjatestament-ligum ljósi, Guds kirkja á jørð eru tey livandi og endurføddu kristnu, ella fyri at nýta málberingina í líknilsinum, tað sáð, sum Menniskjasonurin hevur sáað.

Tí er tað í veruleikanum bert eittans kirkjusamfelag í hesum heimi, og eyðkennið hjá hesum kirkjusamfelag er hvørki statskirkja ella nakar kristiligur felagsskapur, ella nøkur kirkja yvirhøvur. Men í grundini, og so langt sum livandi kristin innan allar hesar kirkjur og samkomur finnast, so langt er Jesu Kristi kirkja har.

Kirkjan er Guds fólk á jørð, hvar enn tú finnur tey. Tey eru sáð Jesu Krists. Tað er ígjøgnum tey Guds ríki fær sína útbreiðslu og endurnýgging. Hetta hendir ofta undir trongum korum og stórari mótstøðu frá kirkjusamfeløgunum. Vit menniskju kunnu ikki kanna hjørtu og nýru. Vit kunnu ikki - og skulu ikki -reinsa Guds kirkjulið. Tað hevur Jesus gjørt okkum greitt. Hann skal sjálvur reinsa samkomu sína, tá hann sendir heilagu einglar sínar út á evsta degi. Men líknilsið er sagt okkum, fyri at vit skulu skilja ta mótstøðu og teir trupulleikar, vit hava sum kristin. vit skulu ikki missa móti. Harrin er við sínum trúgvandi, og tey verða verandi sáð hansara á jørðini, so leingi heimurin stendur.

Hetta vísir okkum eisini, at endurnýgging í Guds ríki kemur ikki av at umskipa trúarsamfeløgini, eitt fyribrigdi sum júst í okkara tíð er vandafult, nú alt skal laga seg eftir meirilutaavgerðum. Hetta ger, at kirkjan sjálv verður gjørd verðslig. Tú skalt fylgja við tíðini. Tey andaligu rák, hugsanir, meiningar, sálarligu stevnumið og tann tónleikur ið uppi er í tíðini, troka seg innar í kirkjuna og gera hana verðsliga.

Andalig endurnýgging hendir á tann hátt, at trúgvandi fólk leita aftur til byrjanina, til tað veruliga upprunastøðið. Tað var til dømis tað ið hendi við Luther. At reformera, er at forma umaftur frá tí upprunaliga støðinum. At reformera er ikki at koma við nøkrum nýggjum, og tað er heldur ikki at gera broytingar. Tað er harafturímóti at fara aftur til sjálva byrjanina, soleiðis sum Guds orð eisini leggur okkum eina við: "Tað sum tit hava hoyrt frá upphavi, latið tað verða verandi í tykkum. Um tað so, sum tit hava hoyrt frá upphavi, verður verandi í tykkum, tá skulu tit eisini verða verandi í soninum og í faðirinum. Og hetta er tann fyrijáttan, sum hann gav okkum: hitt æviga lívið." (1. Jóh. 2,24-25).



Kravið um at vera nýmótans og fylgja við tíðini, er í andaligum høpi sataniskt. Slík krøv koma ikki frá teimum, sum Jesus kallar hitt góða sáðið. Tey koma júst frá tí ónda sáðnum, tí, sum djevulin sáar ímillum Guds fólk. Tað rætta orðið hjá okkum er: Aftur til bíbliuna.

Jesus vísir okkum týðiliga, at einki menniskja kann gera reint borð í teimum viðurskiftum, vit hava víst á. Vit megna ikki at skilja illgresið frá hveitini, men hetta merkir ikki, at tað er í lagið, at alt gongur sína skeivu gongd. Jesus hevur eyguni eftir tí sum hendir. At enda kemur stóra uppgerðin. Tá ið Jesus kemur aftur, tá skal hann savna øll úr øllum ættum jarðarinnar, og tá skulu einglar hans henta alt tað, ið ikki er frá Harranum og skilja tað frá hinum góða sáðið, og tað skal enda í hini ævigu glatan. Tástani skulu børn ljósins koma til sín rætt og skína sum sólin.

Tann, ið oyru hevur, hann hoyrið. Tað er tað Jesus leggur okkum eina við. Hoyra tú og eg.?

## 6. Bønarmenninir í víngarðinum

**Matt. 2 0,1-16**

Til tess at fáa greiðu á hesum líknilsi, er alneyðugt at hyggja eftir tí samanhangi tað stendur í.

Tað byrjar soleiðis sæð longu í kap. 19,2 7 við, at Pætur setur Jesusi hendan spurning: “Sí, vit hava yvirgivið alt og fylgt tær. Hvat verður tá okkara lutur.?”

Grundin er tann, at ein ríkur unglingi var komin til Jesus og hevði spurt hann. “Meistari, hvat gott skal eg gera, at eg kann fáa ævigt liv ?” og Jesus hevði svarað honum, at hann skuldi selja alt, hann átti og geva tað til tey fátæku, so fór hann at hava ein skatt í Himlinum, og so skuldi hann koma og fylgja Jesusi. Hetta gjørdist ov mikið fyri tann ríka unga mannin, og hann fór syrgin burtur.

Tað sum hesin ungi maður varð biðin um, høvdu lærusveinarnir gjørt. Teir vóru farnir frá øllum og fylgdu Jesusi. Vit hoyra ofta um teir fátæku fiskimenninar o.s.fr. sum vóru lærusveinar Jesusar, men vit hugsa ikki um, at áðrenn teir fóru at fylgja Jesusi, vóru fleiri teirra fíggjarliga væl fyri, ja, tveir teirra vóru múgvandi, nevniliga Jákup og Jóhannes, synir Zebudeusar. Zebudeus rak tað sum vit í dag høvdu nevnt fiskiídnað.

Teir fiskaðu á Genesaret Vatninum, hagreiddu fiskin og seldu hann til høvuðsprestin í Jerusalem í stórum mongdum. Har varð fiskurin nýttur á stórum føstuhátíðum, og var tað ein góður handil. Tí stendur tað um Jákup og Jóhannes, at tá Jesus kallaði teir, fóru teir frá bátinum og faðirinum og fylgdu Jesusi (Matt. 4,18-22). Men eftir at lærusveinarnir vóru farnir at fylgja Jesusi, vóru teir fátækir.

Spurningur Pæturs er heilt natúrligur. Lærusveinarnir høvdu gjørt Jesus svarar, at teir so

sanniliga ikki hava gjørt hetta til fánýtis. Teir fara at fáa løn sína. Tann dag, Jesus kemur aftur og himmal og jørð skulu risa upp í einum nýggjum og endurføddum skapi, skulu teir sita á 12 trónum og døma Ísraels 12 ættir. í sama andadrátti sigur Jesus, at eingin, sum farin er frá ætt og tað, Jesus bað hin ríka mannin gera, men sum hann ikki megnaði. ogn síni fyri navn hans skuld, hevur gjørt hetta til fánýtis. Tey skulu fáa endurgjald longu her í tíðini, hóast tað kann vera gjøgnum trongdir, og í ævinleikanum eitt ævigt liv, eina æviga sælu (Matt. 19,29 og Mark. 10, 29-30). Men eftir at Jesus hevur sagt hetta, kemur hann við eini ávaring: "Men mangir, ið eru fyrstir, skulu verða síðstir, og síðstir fyrstir." (Matt. 19,30 og Mark. 10,31).

Við hesum hevur Jesus sipað til, at treytirnar fyri at fáa løn í Guds ríki eru heilt aðrar enn tær ið galdandi eru í heiminum, og sum eina lýsing av hesum ber hann fram líknilsið um bønarmenninar í víngarðinum. (Matt. 20,1-16). Hetta líknilsi verður oftast nýtt sum evni, tá talast skal um arbeiðið í Guds ríki, men í veruleikanum er tað ikki tað, tað snýr seg um, hóast fyritreytin í líknilsinum er at eitt slíkt arbeiði finst.

Boðskapurin í hesum líknilsi er, at í Guds ríki er lønin ikki sett eftir hvat avrikað er, men av náði. Tey sum leigað verða í 11 tíma fáa somu løn sum tey, ið borið hava dagsins sveitta og møði. Hvørki tíðin, tey hava verið í víngarðinum, ella tær byrðar tey hava borið, ella avrikið, tey hava framt, er avgerandi. Vingarðsharrin lønir eftir egnum hjartalag, eftir síni egnu góðsku. Tað einasta ið hevur týdning, er tann sannroynd, at tey hava verið í víngarðinum.

Sum vit síggja gevur hetta líknilsi eina ógvuliga ónatúrliga mynd av tí hátti, lønin verður latin uppá. Tað er heilt ólíkt tí, vit eru von við í hesum heimi. í Guds ríki er spurningurin ikki, hvat vit hava avrikað, men um náði Guds og miskunn. Hetta verður eisini strikað undir av einum fyribrigdi í líknilsinum, sum sjáldan verður hugsað um, nevniliga tann háttur arbeiðararnir verða kallaðir uppá. Eingin víngarðsharri hevði í veruleikanum gjørt hetta á tann hátt, sum líknilsið sigur frá. Hetta sigur okkum, at kallið er av náði. Tað at vera við í arbeiðinum er náði. Tað ein fær loyvi at avrika er náði og lønt verður av náði.

Hvør, ið fyrstur er, og hvør, ið er seinastur í Guds ríki, veit eingin menniskja. Einans víngarðsharrin veit tað. Jesus metir ikki arbeiði okkara í Guds ríki eftir tí, vit menniskju síggja. Tað er einki ið forðar fyri, at ein kristin kann gera ein stóran gerning í Guds ríki, sæð við menniskjaeygum. Kortini fær eitt slíkt avreksverk lítlan og ongan týdning.

Hjá øðrum kann tað tykjast lítilsvert, bæði tað tey gera og tað tey eru, men í Guds eygum og í Guds ríkis samanhangi er verk teirra ovurstórt. Sum sagt: Einans Gud veit hvørji eru tey fyrstu og hvørji tey síðstu. Men ein sannleiki er klárur og greiður: Tað er náði at fáa loyvi at fylgja Jesusi.

Hetta roynir djevulin at avskepla fyri okkum. Mong kenna tað sum eini kravboð, at tey skulu geva seg til Jesus og fylgja honum. Tey síggja ikki, at hetta er eitt tilboð, ein gáva av Himli, ein signing og ein innbjóðing. Tað eru eisini onnur ið halda, at tey gera Jesusi eina stóra tænastu, tá tey geva seg upp til hansara og taka lut í gerningunum. Ein slík hugsan er vandamikil, og er beint tað øvugta av tí, sum líknilsið um bønarmenninar í víngarðinum vísir okkum. Ríki Guds hevur ikki tørv á mær, men mær tørvar Guds ríki. Sannleikin er í roynd og veru at: So leingi ein menniskja heldur, at hon hevur gjørt Jesusi eina stóra tænastu, tá hon fór at taka lut í gerningi hans, so leingi stendur henda menniskja í veruleikanum uttanfyri ríki Guds. Hon hevur enn ikki lært at kenna seg sjálva, og hevur enn ikki fingið brúk fyri einum frelsara.

Tá Heilagi Andin hevur virkað tað, at ein menniskja fær lært seg sjálva at kenna, verður tað ikki ein spurningur um at velja ein frelsara. Ein maður ið er um at drukna, velur sær ikki ein bjargingarmann. Tá vit verða bjargað, er tað ikki okkum fyri at takka. Tá Harrin kallar okkum, er tað náði, og tá vit fáa loyvi at taka lut í gerningi Harrans her á fold, er tað náði. Eg kann ikki gera peningsverk í Harrans tænastu, er tað ikki Harrin sjálvur, ið givið hevur mær ta tænastu. Jesus segði í fráfaringartalu síni, at vit skulu gera teir gerningar sum hann ger (Jóh. 14,12), og fyri hesar gerningar lønir hann okkum.

Í Guds víngarði eru sanniliga aðrar treytir enn tær vit á fold eru von við.

umsett Suni Jacobsen

# Besta valið.

Í Lukas 10,25 kemur ein lógkønur og setir Jesusi ein spurning tí æviga lívinum viðvíkjandi.

Jesus spurdi hann, um hann visti, hvat ið lógin segði um hetta. Maðurin svaraði: "Tú skalt elska Harran, Gud tín, av øllum hjarta tínum og av allari sál tíni og av øllum alvi tínum og av øllum huga tínum og næsta tín sum sjálvan teg." Hin lógkøni visti, at lykilin til alt var at elska Gud fyrst og síðani at rætta henda kærleikan út til onnur menniskju.Tá ið vit nú lesa víðari í Lukas 10, lesa vit um Jesus, at hann fer inn til Martu og Mariu. Marta ger sær ónáðir og stríð av mongum, og betri gjørdist tað ikki, av tí at Maria tóktist ikki at leggja petti í at hjálpa til. Harrin vísti á: "Maria hevur valt hin góða lutin, sum ikki skal verða tikin frá henni."

Jesus segði ikki, at tað var skeivt av Martu at taka sær av menniskjum, sum tørvaðu hjálp hennara. Men stúran hennara tók nakað frá henni, nevniliga eitt vaksandi samband við Harra hennara.

Ofta eru vit so bundin av tænastusíðuni í lívi okkara, at vit lata tað byrgja fyri einum meira inniligum sambandi við Kristus. Maria valdi hin besta lutin. Tað hava vit eisini brúk fyri at gera.

Tað, sum Maria valdi, kundi ikki takast frá henni. Um vit leggja doyin á at fáa eitt tættari samband við Kristus, kunnu vit ikki missa tað, sum vit vinna. Uttan mun til broytingar í fíggjarviðurskiftum okkara, heilsu ella liviumstøðum, fer samband okkara við Kristus at vara við. Okkum er tørvur á at velja besta lutin - at knýta okkum tættari at honum, meðan vit saman við honum ganga fram gjøgnum lívið. Tá ið vit hava valt rætt, kunnu vit hvíla í tí, at vit hava okkurt, sum ikki kann takast frá okkum.

Vel vinin besta og lat hann vera

tín leiðara gjøgnum lívið her.

"Vogt mine lam"

Effie Campbell umsetti.

# Stjørnustundir

"Gud er ljós, og myrkur er als ikki í honum." (1.Jóh. 1,5) "Hvar liggur leiðin, hagar ið ljósið býr, og myrkrið - hvar eigur tað heima." (Job. 38,19)

Tað var ein seinnapart seint á sumri, at eg sat á altanini, sum vendi út til hin vakra urtagarðin hjá "Deutsche Hospice" í botninum av Haifa og las upp á mín hebraiska setning.

Brádliga var tað, sum ljósið varð skrúvað niður. Tað gjørdist kámari og kámari, og eftir 20 minuttum hevði myrkrið, sum kom ongastaðni frá, hertikið heimin.

Eitt fyri og annað eftir vórðu ljósini tendrað í húsunum niðan eftir Karmels fjalli, og so tendraðu ljóskastararnir á Bahai-templinum - dagur var settur, myrkrið kom!

Tað var tíð at fara inn, men torført var at skræða seg leysa, tí nú stigu stjørnurnar út úr myrkrinum. Tær mundu hava verið har alla tíðina, men ikki fyrr enn nú fóru tær at "smílast og veittra".

Var tað so myrkrið, sum rak ljósið burtur? Tað kundi ein freistast at halda. Myrkrið lúrir í øllum krókum, til reiðar at fylla tómrúmini.

Myrkur var yvir frumhavinum, til - ja, til tað máttmikla orðið ljóðaði "Verði ljós!" - Tað má hava rungað gjøgnum alheimin sum Orðið, ið "skapar tað, sum tað nevnir".

Fekk myrkrið so aftur valdið? Tað kundi tykst soleiðis. Men so kom Hann, sum segði um seg sjálvan: "Eg eri ljós heimsins" - ljósið til allan heimin, so strálandi sterkt, at tað kann skína inn í hjartað á hvørjum einstøkum, ikki bara í løtum, men alla tíðina.

Og Jesus segði: "Sum ljós eri eg komin í heimin."

Altso: Fylgist tú við honum, nýtist tær ongantíð at ganga í svørtum myrkri, men hava Lívsins Ljós. Hvat kanst tú ynskja tær meir?

Effi campbell umsetti

"Et Ord med på Vejen"

# Umvending tónlistarmansins

Ein tónlistarmaður ið at Benche lá sum so mangur undur fyri drykkilastini. Men sum menniskja, góður av sær, blíður og fryntligur, hevði konu og børn sum hann elskaði. Men hann kundi ikki vinna sigur á hesi fyri mannaættini so spillandi makt. Vinir hansara hildu tað vera betur fyri hann, um hann kom til aðrar umstøður. Teir fingu hann at fara yvir til Amerika. Har var hann so verandi eina tíð, men støðan var tann sama. Tað sindri av peningi hann kundi vinna sær við at spæla á drykkihúsinum, drakk hann upp so hvørt. Seint eitt kvøldið gekk hann og mól úti á gøtuni og skalv av kulda, hann vildi ikki fara heim til tað kalda kamari har hann búði.

Meðan hann soleiðis gekk og dreiv, kom hann framvið einum upplýstum møtisali, hann fór inn og sá at flest øll í har sótu vóru sama slag sum hann sjálvur, illa klødd og køld. Hann fann sær ein sess og setti seg. Har skuldi vera kristiligur fundur. Beint áðrenn møtið skuldi byrja reisti trúboðarin seg og segði, at organisturin knappliga var vorðin sjúkur og sostatt ikki kundi koma at spæla. Men nú hava nøkur biðið til Guðs, um at tað mátti vera ein til staðar ið kundi spæla uppá urguna. Síðan bað trúboðarin viðkomandi um at koma fram til urguna. Leingi sat Benche og himpraðist. Endiliga reistist hann og fór spakuliga yvir móti urguni. Fólki smíltist, tá tey sóu henda illa klædda og vesæliga mannin koma fram, men tey smíltust ikki leingi tí skjótt hoyrdu tey tónarnar av einum veruligum tónaskaldið, øll sungu nú glað og hugtikin við. Tað var ein listamaður tey hoyrdu spæla. Men fyri tónaskaldið var tað sangurin "Guð er kærleiki" ið fekk so stóran og avgerandi týdning. Hesin sangurin hugtók hann so nógv, at hann fult og heilt og fult gav seg yvir til Jesus. Hann var frá tí stund loystur frá leinkjuni hann hevði verið bundin av "Rúsdrekka-leinkjuni".

Tá ið hin organisturin ikki kundi taka við starvinum aftur – fekk Benche starvið.

Hann komponeraði eisini fleiri sangir, sum høvdu stóran týdning og vóru til stóra gleði fyri trúarlívi hjá mongum menniskjum. Hesin maður var uppreistur av Guðs kærleika í Kristi Jesusi.

Vinur trýr tú eisini á henda kærleika, tí hann er eisini fyri teg. Hann elskar okkum og líka sum faðirin fór ímóti tí burturvilsta soninum við opnum favni og tók ímóti honum aftur, uttan briksl, men hjartans glaður, tí hann hevði fingið son sín aftur.

Soleiðis tekur Jesus eisini ímóti einum og hvørjum, sum í trúgv vendur um til hann. Jesus hevur sjálvur sagt: " Alt, sum faðirin gevur mær, skal koma til mín; og tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur. Jóh. 6, 37

Umsett úr donskum G. W.

# Guð er førur fyri at hjálpa eisini tá tað tykist ógjørligt

*Frá álítandi keldu verður sagt frá hesum tilburði.*

Í einum fangagarði stóðu nakrir russiskir brotsmenn leinkjaðir saman, teir skuldu beint nú fara undir ta ræðuligu og longu ferð til Sibiria. Teirra millum var ein kristin maður, sum var dømdur til sama straff sum hinir – vístur úr landinum, tí hann, sum bert var arbeiðari, hevði játta við felagar sínar um tann frelsara og ta trúgv sum hevði borði honum eitt nýtt hjartað og nýggja tungu.

Hinir fangarnir háðaðu hann og søgdu: "Tær gongst ikki mætari enn okkum, tú noyðist at bera leinkjur eins og vit. Um Guð tín er førur at hjálpa tær hví loysir hann so ikki leinkjur tínar og fríar teg?"

Maðurin svaraði álvarsamur: "Um Harrin vil, so er hann mentur at hjálpa mær eisini nú, og eru hendur mínar bundnar, er hjarta mítt frítt" .

Í somu løtu rópti ein vaktarmaður navn hansara og boðaði frá, at júst nú var komið eitt skriv, sum heilt loysti hann frá straffinum. Tað sigst at fangarnir vóru reiðiliga hugtiknir av hesar hending sum teir vóru vitni til.

Seinni kom tað upp, at ein hámett kvinna, sum tókti synd í tí fátæka arbeiðara, hevði tikið sær av søk hansara, hevði lagt gott orð inn fyri hann og hevði borið tað so í bandi at hann varð latin leysur.

Var tað ikki løgið, at Guð læt boðini koma júst í hesi løtu ! Og hvør veit, um ikki hesin tilburður varð til signing fyri nakrar av hesum neyðar brotsmonnum, ið sum fangar máttu fara úr heimi sínum og føðilandi.

R.

# Tøkk

Kristi Himmalsferðadag varð savnað inn í kirkjum kring landið til heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnun.

Hjartaliga takk fyri gavurnar.

| | |
|---|---|
| Christianskirkjan | 6.493,25 |
| Eiðis kirkja | 3.370,00 |
| Elduvíkar kirkja | 300,00 |
| Fríðrikskirkjan | 5.194,00 |
| Funnings kirkja | 465,00 |
| Glyvra kirkja | 3.872,00 |
| Gøtu kirkja | 33.210,00 |
| Havnar kirkja | 5.364,25 |
| Hvannasunds kirkja | 3.342,25 |
| Kvívíkar kirkja | 510,00 |
| Leirvíkar kirkja | 6.007,50 |
| Miðvágs kirkja | 4.442,50 |
| Mikladals kirkja | 620,00 |
| Nólsoyar kirkja | 1.129,00 |
| Norðskála kirkja | 1.060,00 |
| Oyndarfjarðar kirkja | 1.455,00 |
| Porkeris kirkja | 1.080,00 |
| Rituvíkar Kirkja | 700,00 |
| Sandavágs kirkja | 3.650,00 |
| Selatraðar kirkja | 687,00 |
| Sjóvar kirkja | 3.660,00 |
| Skála kirkja | 4.890,00 |
| Sørvágs kirkja | 1.436,00 |
| Vesturkirkjan | 11.031,00 |
| Viðareiði | 1.520,00 |
| | |
| Tilsamans | 105.488,75 |

Tað eru kanska kirkjur eftir, sum ikki hava flutt peningin, ella av missgávum ikki eru komnar við

Kirkjuliga Missiónsfelagið

# Jesus einsamallur, bara Jesus.

Tríggjar dagar fyri deyða sín varð hin viðgitni listamálarin Gustave Doré (1833-1883) liðugur við stóru mynd sína: Táradalurin.

Á hesa mynd hevði hann málað heimsins líðingar, sorgir, trongdir og pínur. Hann málaði ein kong, sum suffaði undir tyngdini av krúnuni, eina mammu við doyggjandi barni sínum á fanginum, sjúk við sínum ósigandi pínum og verkum, ein spitalskan við sínum upptærdu limum, brotsmenn, píndar av samvitsku síni. Men øll andlit vóru vend móti tí hjástadda Jesusi, hendurnar á øllum vóru rættar út móti honum, sum peikaði uppeftir móti Guds staði, har eingi tár, ongar líðingar og eingin pína er til.

Við mynd síni vildi Doré peika á Jesus Jesus einsamallan, bara Jesus - sum Frelsara heimsins.- -

Gud er hin einasti, vit kunnu líta okkum upp í hendurnar á uttan at óttast fyri at verða lumpað, svikin ella misbrúkt á nakran hátt. Um vit gera eina vanliga menniskju til okkara lívs alt og eitt, tá fara vit at verða vónsvikin.

"Et Ord med på vejen"

E. Campbell umsetti.

# Orðagátuloysn



# Dana

Eg arbeiddi nøkur ár á sjúkrahúsinum á Arba Minch. Ein evangelistur var settur har. Hann hjálpti við morgunandaktunum, sum vórðu havdar uttanfyri sjúkrahúsið á verandanum. Har rúmaðust nógv fólk. Nógv vóru komin tíðliga, berandi við sjúklingum ymsa staðni frá, onnur vóru komin við bussi og aftur onnur til gongu. Nógv av starvsfólkunum steðgaðu á, tá ið tey komu til arbeiðis og lurtaðu til andaktin var liðug. Har vóru sostatt nógvir møguleikar at boða evangeliið. Evangelisturin gekk runt á stovunum og talaði við sjúklingarnar um Jesus. Nógv komu til trúgv, vegna hansara vitnisburð.

Hetta var á einum sjúkrahúsi í Etiopia, har kommunistarnir ráddu fyri borgum. Teir sum læra, at eingin Guð er til. Eitt satt Guðs undur.

Missiónin hevði fingið loyvi at koma inn í landið. Treytir vóru lagdar við at vit skuldu hjálpa á ymiskan hátt, t.d. at reka skúlar og at hjálpa teimum sjúku o. a. Hetta var júst í tráð við bíbliuna, sum er grundvøllurin undir arbeiði okkara. “Jesus ferðaðist um allar staðir og bygdir og lærdi í samkomuhúsum teirra og prædikaði gleðiboðskapin um ríkið og grøddi hvørja sjúku og hvørja ilsku”. Matt.9,35. Hetta arbeiðið hevur opnað dyrnar fyri evangeliinum bæði hvat ið skúlaarbeiði og sjúkrarøkt viðvíkur. Sjálvt, tá ið vit eina tíð, ikki fingu loyvi at fara út í bygdirnar at boða gleðiboðskapin, komu sjúklingarnir inn á missiónsstøðina at fáa likamliga hjálp. So hoyrdu tey Guds orð har.

Landið tørvaði hjálp á mangan hátt. Stjórnin í landinum visti, at fingu vit ikki loyvi at boða Guðs orð, var vandi fyri at vit rýmdu. Vit høvdu fingið loyvi at vera í landinum, sum eiti Missiónsfelag, og við tí sum tað innibar. Sjálvt um tað kundu vera trupulleikar av ymsum slagi, so fingu vit missionerarnir ongantíð forboð at boða Guds orð. Har aftur ímóti vóru tíðir sum etioparnir møttu nógvari mótstøðu tá ið teir prædikaðu úti í bygdunum og lærdu fólkið frá Guds orði. Nógv hava tí sitið í fangahúsi fyri orðsins skuld.

Eg var í landinum øll árini, sum kommunistarnir ráddu fyri borgum, frá 1974 - 1991. Meðan eg arbeiddi á sjúkrahúsinum í Arba - Minch kom ein nýggjur sjúkrahússtjóri, Dana æt hann. Vit arbeiddu nógv saman og mær dámdi hann væl. Onkur segði mær at hann var trúgvandi og gleddi tað meg nógv at hoyra.

Ein dagin spurdi eg hann um hann ikki vildi hava morgunandktina ein av komandi døgunum. Andakt var hildin hvønn morgun úti á verandanum, áðrenn arbeiðið byrjaði. Tað kom honum ikki væl við. Nei, segði hann heldur hvassliga, tað vildi hann ikki hava nakað við at gera. Hann segði tó onga grund fyri tí. Ja, so visti eg tað, og spurdi hann ikki aftur.

Seinni fór graml at ganga um at Dana var millum teirra, sum píndi tey kristnu. Tað fekk eg meg ikki til at trúgva. Men so ein morgunin, vit komu til arbeiðis frættu vit at løgreglumenn høvdu verið og tikið Dana um náttina og sett hann í varðhaldið. Orsøkin var ikki tann at hann hevði pínt tey kristnu, men at hann var mistonktur fyri at vera við í einum bólki, sum arbeiddi móti stjórnini í landinum. Hetta vistu vit einki um.

Seinni um dagin, kom ein inn á skrivstovuna til mín og segði at løgreglan var komin við Dana. Hann skuldi geva frá sær arbeiði á sjúkrahúsinum, til ein annan og so skuldu teir avstað aftur við honum. Teir vóru nú inni á skrivstovuni hjá honum. Eg má siga, at eg var skelkað av at hoyra hetta.

Eg fór inn á skrivstovuna at vita hvat ið fór fram. Aldri gloymi eg, tá ið eg sá Dana, har hann sat við skriviborðið. Hann sá so hjartkiptur út. Alt hárið var rakað av høvdinum og skóleysur var hann. Tveir hermenn við byrsu stóðu við liðina á honum, í einum horni, sat kona hansara, við einum lítlum barni í fanginum. Eisini hon sá rædd út. Í hesi umstøðum kundi tað ikki blíva nøkur samtala okkara millum. Eg spurdi hann á enskum máli, av tí at eg helt kanska at hermenninir ikki dugdu enskt, um hann vildi hava eina bíbliu? Nei, segði hann, men gev konu míni eina. Eg fór út eftir bíbliuni og rætti konuni hana. Tað bleiv ikki meira talað okkara millum, uttan at eg segði: “Harrin verið við tær Dana”. “Takk”, segði hann. Síðani fór eg. Dana bleiv sitandi í fangahúsinum. Tað| fyrstu tíðina frættu vit ikki meira um hann. Fangahúsini í landinum vóru í ringum standi og trongligt var. Mær var sagt, at tað sótu umleið 400 fangar í fangahúsinum í Arba Minch. So har má hava verið trongligt. Mangan gingu umfarsjúkur inni í fangahúsinum og fleiri doyðu. Fangar vórðu ofta sendir til sjúkrahúsið til viðgerð. Tá komu altíð hermenn við, at ansa eftir teimum. Ta tíðina seldu vit bíbliur til ein lágan prís á sjúkrahúsinum. Hungurin eftir Guds orði var stórur. Nógv komu og vildu hava bíbliur. Tey sum ikki kundu gjalda, fingu tær ókeypis. Peningur til at keypa tær komu úr Føroyum. Ofta komu fangar til mín, tá ið teir sóu meg á

gongini og spurdu um teir ikki kundu fáa eina bíbliu. Eg vildi ikki at tað skuldi vera nakað duldarmál, at vit høvdu bíbliur, so eg spurdi altíð hermenninar sum komu við pengunum, um tað var í lagið, at eg gav teimum eina bíbliu. Svarið var altíð, "Ja gev teimum bara". Tað hendi ikki so sjáldan, at hermenninir sjálvir bóðu um at fáa eina.

Stundum var Dana teirra millum, sum komu úr fangahúsinum til viðgerð. Teir vóru altíð umringaðir av vaktarmonnunum, so tað bar ikki til at fáa eina samtalu við hann Eg fekk tó tikið í hondina á honum og sagt: "Vit biðja fyri tær." Hann smíltist og segði: "Takk". Einaferð Dana kom, var hann so sjúkur, at hann mátti leggjast inn. Hann var lagdur inn á tann stóra salin, har tað vóru 24 sengur. Hálvir veggir vóru millum hvørjar fýra sengur. Um kvøldini plagdu vit at hava andakt á sjúkrastovunum. Eitt kvøldið eg hevði haft andakt, á tí stóru stovuni, har sum Dana lá og var á veg út, veittraði hann meg yvir til seingina hjá sær. Eg havi nakað at siga tær, segði hann. Hann hevði skund. Vaktarmaðurin var farin útum og kundi koma aftur hvørja løtu. Eg var trúgvandi, byrjaði hann og var íðin í tænastuni, at boða Guds orð. Sum tú veist, so hevur verið stór atsókn móti teimum kristnu, serliga tey seinastu árini. Eisini eg var settur í fangahús fyri orðsins skuld. Tá var tað ikki ringt, at sita inni, tí eg visti hví eg sat har. Eg hevði himmalin sum mál. Síðani bleiv eg vavdur inn í onnur mál, bleiv ávirkaður og drigin við í mangt og hvat. Kom sjáldnari á møtir og saman við teimum trúgvandi. Tað endaði við at eg misti trúnna og fór at gera tað sum eg ikki átti at gjørt. Sum tú veitst, so er orsøkin ein onnur fyri at eg siti í fangahúsi hesaferð. Hetta hevur verið ein ræðulig tíð. Alt hevur verið uttan mið og mál. Eg havi haft tíð at hugsa um lívið. Hví var eg farin av leiðini? Eg kom í sálarneyð og rópti til Guð í neyðini. Inni í fangahúsinum er eitt lítið "kapell" Har plagdi eg at fara viðhvørt. Ein annar fangi kom ofta har meðan eg var. Bíbliur lógu uppi á einari hill. Vit sótu ofta báðir og lósu í bíbliuni. Eg tordi ikki at tala við hann um mína støðu. Kanska var hann njósnari? Guð hoyrdi róp mítt og kom mær til hjálpar og eg tordi at hvíla í syndanna fyrigeving fyri Jesu Kristi skuld. Nú vil eg fylgja Jesusi, kosta hvat tað kosta vil, segði hann. Eg bleiv ómetaliga glað at hoyra hetta. Vit missionerarnir høvdu bønamøti júst hetta kvøldið, so tað bleiv ein gleði og takkarstund, til hansara, sum hevði givið okkum bønarsvar. Dana bleiv sitandi í fangahúsinum. Stundum kom hann til sjúkrahúsið, saman við øðrum til sjúkraviðgerð. Sum fyrr, so vóru fangarnir altíð umringaðir av vaktarmonnum sum komu við teimum, so tað var torført,at fáa nakra samtalu við Dana. Men eg fekk altíð heilsa uppá hann Tvey ár eru nú liðin, síðani Dana var fongslaður. Tíðin nærkaðist til at eg skuldi fara heim. Eitt tíðarskeið var nú aftur liðugt. Vit trúboðarar eru úti eitt ávíst tíðarskeið, og fara so heim eina tíð,at hvíla og ferðast til møtir og siga frá arbeiðum, sum vit standa í harúti, til vit so aftur fara avstað aftur, til eitt nýtt tíðarskeið í tænastuni harúti. Ein sunnumorgun, eg gjørdi meg til at fara í kirkju, stendur Dana knappliga í durunum. Eg var eitt sindur kløkk. "Dana! ert tú leyslatin!" spurdi eg. "Ja" ,segði hann, fyri tveimum døgum síðani slapp eg út úr fangahúsinum. Eg bað hann koma inn. Vit prátaðu saman ein drúgva løtu. Hann segði mær at hann ein dag hevði fingið at vita, at nú kundi hann fara. Hetta var enn so óveruligt fyri honum. Hann segði at hann ofta hevði kenslu av, at onkur var í hølunum á honum og vildi taka hann aftur. Vit høvdu nógv at tala saman um, so tað bleiv eingin kirkjugongd fyri meg hendan dagin. Vit lósu Guðs orð og bóðu saman áðrenn hann fór avstað, Hann spurdi um hann kundi koma aftur næsta sunnudag. Hann hevði so nógv at samtala um. Sjálvsagt segði eg, at hann var vælkomin. Hann kom sum avtalað og vit fingu aftur eina góða samtalu. Tá ið hann skuldi fara, spurdi hann, um hann eisini kundi koma aftur um eina viku. Eg segði, at tað nú bara var ein góð vika til eg skuldi fara úr Arba Minch hesaferð, men bað hann endiliga koma. Men tá kom hann ikki. Eg fór avstað til ásetta tíð og frætti einki meira um Dana.

Eini tvey til trý ár gingu. Eg hevði verið heima og var úti aftur. Onkuntíð spurdi eg onkran um Dana, men tey vistu einki um hann. So einaferð eg var í Addis Abeba, ørindi fyri sjúkrahúsið, hitti eg honum aftur. Tað var sunnumorgun. Eg fór í eina "Mekane Yesus kirkju," sum er nær við missiónsstøðina í Addis Abeba. Hendan kirkjan er stór. Tekur fleiri hundrað fólk. Hon var full av fólki. Aftaná gudstænastuna, standa fólk uttanfyri og heilsa uppá hvønn annan og práta. Mitt millum fólkið bar eg kenslu við eitt andlit, men visti ikki beinan vegin hvør tað var. Vit hugdu uppá hvønn annan og so knappliga gekk tað upp fyri okkum báðum hvør í hvør var. Hann kom ímóti mær, og vit hálsfevndust, sum siður er í Etiopia. Hann sá so glaður út, andlitið skein sum ein sól. Alt tað dapra í andlitsbránum, sum fyrr hevði verið,var burtur.

Nú búði hann í høvuðsstaðnum, saman við konu og børnum og tey høvdu tað gott øll, fortaldi hann mær. Tey komu regluliga í "Mekane Yesus kirkjuna" og høvdu tað gott andaliga sæð. Hetta var alt gleðiligt hjá mær at hoyra og eg takkaði Guði í hjarta mínum, sum hevði varðveitt tey í trúnni.

Elsa Jacobsen

# Trojanskir hestar.

Tá ið vit lesa tær gomlu griksku sagnirnar, koma vit eisini fram á hin trojanska hestin. Skaldið Homer greiðir frá, at býurin Troja fall av einum ovurstórum træhesti, sum álopsmenninir høvdu latið staðið eftir uttan fyri múrarnar, tá ið teir eftir øllum at døma góvust við álopinum. Tey forvitnu fólkini í Troja bóru hestin inn í býin uttan at gruna, at hermenninir hjá fíggindanum lógu og goymdu seg inni í tí ovurstóra búkinum, sum var opin innan. Tá ið náttin kom, krupu teir út og settu eld á býin.....

Í dag brúka vit ofta hugtakið "trojanskur hestur" um fimtukolonnur - fíggindar, sum lúra seg inn á økið hjá mótstøðumonnunum. Hvat ið hetta hevur at gera við tey kristnu, ja, tað átti at verið einfalt at skilt: fíggindarnir blanda seg upp í verjudeildirnar og falla í bakið á hermonnunum, tá ið bardagin byrjar.

Hin trojanski hesturin kann eisini koma inn um múrarnar í meinigheitini. Bíblian talar bart út og kallar ávísar gerðir synd. Men í "okkara mentan" vísa vit slíkt tolsemi mótvegis einstøkum syndum, at vit at enda als ikki síggja tær longur, t.d. øvundsjúku. Sleppur hon innum, og hjúkla vit um hana, so varar ikki leingi, til vit ikki síggja øvundsjúkuna sum tað, hon er: ein synd. Kanska broyta vit navnið á henni og kalla hana "rættvísi", og so sleppur hon ótálmað at eitra viðurskiftini. Øvundsjúkan er bert eitt dømi av mongum. Allar syndir, sum vit loyva og ikki játta fyri Gudi, eru vandamiklar.

Tí "trojanskir hestar" eru ein partur av álopsætlanum djevulsins. Tær devulssettu kreftirnar berjast við blóðigum álvara at bróta niður kristna trúgv og siðalæru. Tað er eitt klókt listarbragd at fáa sníkt óndskapin innum og síðani falla í bakið á teimum, sum innanfyri eru, so at mótstøðumegin viknar. Hetta er eitt gamalt bragd, sum vit eiga at vænta og lættliga kenna aftur.

Hvussu kunnu vit standa ímóti hesum? Hin heilagi Gud vil, at børn hansara skulu vera heilag. Hann gevur okkum kraft at liva rætt. Vit mugu tala bart út um tað og eggja bæði hinum einstaka og meinigheitini at gera eina roynd: brúka orð Bíbliunnar um rætt og galið sum ein spegil, so hin ávísa syndin verður uppdagað, áðrenn hon etur um seg. Um vit skulu liva sum kristin, so treingja vit til at gera upp við syndina, játta hana og fáa syndanna fyrigeving frá Gudi.

"Krigsropet" E. Campbell umsetti

# Vippan

Tað besta á sumri var at fara yvir í uttandurasvimjihylin. Hann var heilt tætt við har, sum Rói búði. Rói fór saman við vinmonnum sínum yvir hagar, langt áðrenn hann dugdi at svimja. Men nú svam hann sum fiskurin. Hann kavaði eisini og bóltaði rút í vatninum og blásti sum ein annar kópur. Hann hevði helst viljað verið í hylinum allan dagin, um hann slapp. Nú kom Árni eisini. Hann rópti: "Komið, so leypa vit frá tríggjametravippuni!" Allir lupu aftan á Árna. Men ikki Rói! Hann fekk kaldasveitta, bara hann hugsaði um vippuna, og helst hevði hann viljað smokkað niður í jørðina. Tríggjametravippan? Ongantíð á ævini! Heldur vildi hann druknað á staðnum! "Kom nú, Rói! Drív á! Ella ert tú ræddur, ha?" "Eg **noyðist** vist," hugsaði Rói, tá ið hann kleiv upp á kantin og spakuliga togaði seg upp í stigan. Har niðri lá vatnið. So ómetaliga djúpt niðri! Og so svart! "Nei, so kortanei! Eg bíði, til hinir hava lopið. So fari eg niður gjøgnum stigan aftur," hugsaði hann. Men tá rópti Árni: "Rói skal leypa fyrst! Kom nú, lítli Rói! Leyp, so vit síggja, at tú torir!" Árni líka sum rak hann fyri sær á vippuni. Á, sum tað var langt niður til vatnið! Rói tordi ikki at hyggja niður. Hann sleit seg leysan og rópti: "Eg vil ikki! Eg vil ikki! Eg vil sleppa niiiiður!!" Niðri við stigan hoyrdi hann ein háðandi látur. "Ha, ha, ha, hann torir ikki!

Sum hann er ómansligur!”

Rói fór beint til hús. Hann var fúkandi óður. Tað var einki stuttligt longur. Abbi sat í garðinum og sólaði sær. “Ert tú longu aftur? Hevur tú havt tað stuttligt í svimjihylinum?” “Eitt sindur,” svaraði Rói. Men hann hugsaði, at abbi óivað spurdi, av tí at hann sá, at hann ikki var serliga glaður. Tí kundi hann líka so væl siga honum alla søguna, sum hon var. Og so segði Rói tað, sum hendi við vippuna. “Veitst tú hvat?” segði abbi, tá ið Rói var liðugur at siga frá. “Hoyr meg, tað er als ikki so høgt, sum tú heldur. Tað er bara, av tí at tú ert bangin, at tú heldur, at tað er so høgt. Og tú ert bangin, av tí at tú ongantíð hevur lopið fyrr. Eg skal koma við tær. So leypa vit báðir - eg fyrst.” “Túúú? Nei, tað hugsi eg ikki, at tú ert førur fyri!” Rói stóð sum kánus. “Ájú,” flenti abbi. “Eg kann sum einki leypa av tríggjametravippuni, og eg eri ikki bangin heldur! Tað ert tú bara fyrstu ferð. Síðani dugir tú, og so er tað sum fótur í hosu. Kemur tú við?” “Ja, kanska ...,” svaraði Rói ivandi. Men um kvøldið, tá ið næstan eingin var í hylinum, fóru Rói og abbi hagar. Saman klivu teir upp gjøgnum stigan og fóru út á vippuna. Fyrst leyp abbi. So blundaði Rói - og leyp. “Hjálp!” ætlaði hann sær at rópa, men hann fekk ikki stundir. Hø, tað var ikki so vandamikið kortini! Aðru ferð hann leyp, sýntist tað enn styttri, og tá ið hann hevði lopið fýra ferðir, helt hann, at hetta var einki petti fyri. Sum hann hevði verið býttur! Tá ið tann erpni Árni dagin eftir kom og spurdi við einum háðandi látri, um nøkur bloyta var her, sum ikki tordi at leypa frá tríggjametravippuni, kleiv Rói róliga upp gjøgnum stigan. Og áðrenn Árni hevði fingið stundir at latið munnin aftur, hoyrdist eitt bums - og har svam Rói longu, púra óræddur, og beint eftir kom hann upp undan kavi.

Effie Campbell umsetti.

## Nýggir haldarar

Eg ynski at halda “Kirkjuligt Missiónsblað”.

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Postnr. og bygd/býur: ______________________________

Undirskrift: ______________________________

*At senda til:*

Kirkjuligt Missiónsblað, Purkugerði 7, FO-100 Tórshavn

# BARNASÍÐAN

## Káin og Ábel

Ádam og Eva fingu nógv børn. Elsti sonurin æt Káin og tann næstelsti Ábel. Káin var jarðarbrúkari, og Ábel var seyðamaður. Báðir plagdu at ofra til Guðs, men Gudi dámdi betur offurið hjá Ábeli enn hjá Káini, tí Ábel ofraði av betri huga. Tá gjørdist Káin illur og gekk og lútaði við høvdinum. Guð ávaraði hann ímóti at ganga soleiðis, tí at tað kundi føra til, at syndin fór at vinna á honum, og hann bað hann ístaðin vinna á syndini.

Káin lurtaði ikki eftir Gudi og gjørdist alt meiri øvundsjúkur inn á Ábel. Tað endaði við, at Káin ein dagin drap Ábel. Eftir hetta koyrdi Gud hann burtur frá akurlendinum, og Káin mátti flýggja og flakka um jørðina. Fyri at onkur ikki skuldi fara at drepa Káin, setti Gud eitt merki á hann. Hann búsettist síðani í einum landi eystan fyri Eden og fekk konu og børn.

Hyggið at spurningunum og finnið svarini í orðagátuni.

# BARNASÍÐAN

| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| W | O | L | V | F | S | R | Ø | V | U | N | D | S | J | Ú | K | U | R | W | S | I | M | V | T | X |
| A | A | Q | K | V | T | O | Y | X | L | D | F | J | H | D | I | R | X | L | Z | Q | N | E | O | Q |
| G | V | H | T | V | C | H | U | N | P | W | B | T | F | Q | W | H | E | K | E | E | O | B | G | O |
| Y | Q | Y | N | V | P | Q | B | S | Y | E | S | I | H | A | C | A | V | B | W | S | T | G | U | Q |
| Y | G | N | U | X | M | A | W | O | Á | B | E | L | W | Y | E | T | X | N | W | W | H | R | V | C |
| X | N | W | U | I | Y | Q | E | J | O | L | C | Z | Q | C | W | B | P | G | F | D | U | M | E | D |
| Z | R | E | D | R | A | P | P | S | A | U | U | F | T | D | L | F | H | V | D | E | G | Q | N | B |
| S | Y | G | G | T | L | E | D | D | S | E | Y | Ð | A | M | A | Ð | U | R | R | C | Z | M | J | J |
| Q | J | K | S | D | A | H | R | Q | Z | X | C | R | P | Q | J | T | Q | S | Q | U | X | B | X | W |
| Q | M | R | F | H | B | A | F | X | A | R | K | F | L | J | T | Q | K | L | A | X | S | O | N | D |
| D | I | C | B | D | Y | Y | K | Z | D | I | G | Q | D | D | W | V | N | B | A | D | U | K | H | U |
| Y | B | X | M | Z | B | D | E | W | U | F | L | Ý | G | G | J | A | K | A | H | L | P | U | R | O |
| X | Y | M | J | D | G | O | S | R | R | K | Y | J | R | S | J | P | V | W | I | C | S | C | D | H |
| R | T | N | O | W | X | S | J | V | J | Y | O | V | M | K | Á | I | N | Y | N | Z | K | J | X | Y |
| H | O | Z | C | Y | B | B | F | P | O | V | Y | M | G | D | O | Z | H | M | B | C | W | N | H | E |
| B | J | A | R | Ð | A | R | B | R | Ú | K | A | R | I | V | I | S | Z | L | O | F | F | U | R | G |
| W | S | J | I | A | J | C | U | T | C | F | N | X | W | O | I | O | M | W | M | D | F | Z | H | V |

1. elsti sonurin var .......
2. Káin gjørdist ............
3. næstelsti sonurin var ....
4. Káin mátti .........
5. Teir bóru Guði .......
6. Elsti sonurin æt .......
7. Káin ........ Ábel
8. næstelsti sonurin æt ...........

*Postavgreitt blað*

# Pápi hjálpti mær upp

Ein skipari, sum sigldi í Eystursjónum, hevði á einum av sínum ferðum konu og lítlu dóttir síns við umborð.

Ein dagin tá hendan lítla gentan stóð undir liðini á skipsdreinginum og hugdi hvussu vakurt alt var, har tey sigldu tætt framvið strondini, Knappliga kemur ein hvirla, ið sleit eitt segl leyst og í sama viðfangi tók tað lítlu smágentuna, so hon datt fyri borð.

Mamman sum stóð tætt við, var ræðslusligin. Pápin loysti í skundi ein av bátunum, loyp sjálvur niður í hann og róði alt hann var mentur, meðan gentan fleyt longur og longur burtur frá skipinum. Tað eydnaðist tó í evstu stund at fáa fatur í hana áðrenn hon sakk.

Tá nú gentan nú aftur stóð á skipsdekkinum hjá pápanum, sigur mamman við hana: "Mítt stakkals barn, hvat hugsaði tú meðan tú lá harúti og fleyt á sjónum ? Vart tú ikki bangin? Gentan svaraði: "Nei, eg var ikki bangin. Eg hugsaði alla tíðina at Pápi kemur óivað skjótt og hjálpir mær uppaftur"
Kæra Guðs barn, sum kanska ert úti á myrkursins havi ! Ver ikki bangin ! Tú skalt ikki ivast í at faðir tín í Himlinum kemur í rættari tíð og hjálpir tær upp.

G. W ( úr donskum )


*Umbróting:*
Brandur Petersen

*Prent:*
Estra

*Ábyrgd:*
Kristian Thorleifsson

*Útgevari:*
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 225511
T-postur: kmf@kmf.fo
Heimasíða: www.kmf.fo
Konta: 9181-495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað kemur út 8 ferðir um árið (1/2, 15/3, 1/5, 15/6, 1/8, 15/9, 1/11, og 15/12)

Haldaragjald: kr. 150,-